

# Eldurin byrjaði við komfýrin

*Eini sethús á Norðskála brunnu í grund fríggjadagin. Eftir øllum at døma er onkur komin undir knøttin til eina plátu á komfýrinum, sum síðani hevur fest í*

Sveinur Tróndarson

Tað var eftir øllum at døma ein pláta á komfýrinum, sum festi í tilfar, sum eigaramaðurin hevði lagt í so nær plátuni. Tá løgreglan og sløkkiliðið fekk boðini hevði eldurin fingið fastatøkur og húsini stóðu ikki til at bjarga.

Tað var beint áðrenn klokkan eitt fríggjadagin, at løgreglan fekk boð um, at tað brann í einum sethúsum á Norðskála.

Løgreglan og sløkkilið fóru beina leið á staðið, men tá løgreglan kom til Norðskála, var einki at gera. Húsini stóðu í ljósum loga, og tjúkkur svartur roykur stóð úr teimum. Sløkkilið royndi alt sum teir vóru mentir, men teir fingu ikki forða fyri, at alt brann innanúr húsunum.

Av løgreglustøðini í Runavík frætta vit, at orsøkin til eldin eftir øllum at døma var, at maðurin, sum hevði rudda í húsunum, var komin undir komfýrin. — Tað er ikki óhugsandi, at hann óviljaður hevur tendrað eina plátu, sum síðani hevur fest í tilfari, sum hann ruddaði upp. Nakað av tí tilfarinum hevur ligið ov nær plátuni, og vit meta, at tað er soleiðis, at eldurin hevur fest í, sigur vakthavandi á støðini í Runavík.




*Tubbaksráðið – spurningar og svar um tubbak: »At gevast!«*

## Hví er so ringt at gevast at roykja?

Eitrið, sum er í tubbaki, er ikki minni turvelvandi enn heroin og kokain. Tá ið tú roykir tubbak, kveikjast mótstøðustøð í nervalagnum í heilanum. Tá ið móttøkustøðini ikki fáa nóg mikið av tubbakseitri, verður tú illa fyri. Kroppurin tørvar tubbakseitur bara til at føla seg vanligan.

*Er vanligt, at tú merkir, at tú roynir at gevast?*

Ja, nógv ymisk eg eyðkenni hoyra vanliga til, tá ið tú roynir at gevast. Ikki øll føla tað sama. Nøkrum fellur tað merkiliga lætt. Hjá øðrum stendur ikki so væl til í nakrar dagar.

*Hvørji felagseyðkenni eru og hvat fái eg gjørt, so eg megni tað?*

Verður tú erkvisin – far ein gongutúr, far í brúsubað, anda djúpan, jagla tyggigummi við nikotini í. Verður tú eitt sindur í ørviti, flyt teg eitt sindur spakuligari, skift spakuliga støðu. Fært tú ilt í høvdið, anda djúpan, fá tær eina aspirin. Møðist tú, syrg so fyri at tú fært góðan svøvn, fá tær ein eyka blund, royn og slepp tær undan trýsti, jagla tyggigummi við nikotini í.

Kemur svøvnloysi á teg, drekk so ikki kaffi eftir kl. 18, anda djúpan.

Fert tú at hosta, drekk so nógv vatn, fá tær hostabomm ella kandissukur.

Fært tú ikki savnað tankarnar, royn at lætta um arbeiðsbyrðuna í nakrar dagar, slepp tær undan trýsti.

Broytist sodningin, drekk nógv vatn, et frukt og grønmeti saman við hinum, tú etur.

Kennir tú svongd, drekk nógv vatn, hav munnbitar hjá tær, sum ikki er fullir av kalorium og feitti.

Leingist tær eftir tubbaki, stand ímóti trongdini; tubbakshungurin minkar.

*Hvussu leingi merkir tú, at tú nýliga ert givin?*

Eyðkennini eru bara í byrjanini! Fyrstu tveir dagarnir eru vanliga teir ringastu. Tað er tíðin, tað tekur at skola tað mesta av tubbakseitrinum burtur úr kroppinum. Tær næstu tvær vikurnar siga roykjarar seg kenna færri og færri árin.

*Hvussu »dragi eg andan djúpan«?*

Set teg niður ella legg teg og royn at hvíla. Fá hugin at klárna. Fyll lunguni spakuliga, meðan tú telur upp í 5, halt andanum, meðan tú telur upp í 3 til 5. Blás so spakuliga luftina út, meðan tú telur upp í 5. Ger hetta 5 ferðir umaftur. At draga andan djúpa fyllir blóðið við súrevni og hevur tað við sær, at blóðtrýstið lækkar. Roykjarar kunnu læra seg hetta sum partur av fyrireikingunum til at gevast. Tað er gott at duga hjá øllum, sum royna at sleppa undan trýsti!

**Næstu ferð: »Hví tað loysir seg at gevast«**

## Doktararitgerð um laksakanningar norðanfyri

Í dag verjir Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur, doktararitgerð (dr.scient.) við Lærda Háskúlan í Bergen.

Ritgerðin, ið er um villan laks, hevur heiti: „Aspects of the marine ecology of Atlantic salmon“.

Opponentar verða: Dave Reddin, granskari við Northwest Atlantic Fisheries Centre, Canada

Anders Klemetsen, Professari við Universitetið í Tromsø, Noreg.

Endamálið við kanningunum var at lýsa leiklutin hjá laksi í vistfrøðiligu skipanini norðan fyri Føroyar.

Kannað er, úr hvørjum londum laksurin norðan fyri Føroyar stavar, føðin hjá laksi, laksalús og lutfallið av rýmdum alilaksi í veiðuni.

Eisini er gongdin í føroyska laksafiskiskapinum lýst.



*Jan Arge Jacobsen, sum í dag skal verja doktararitgerð í Bergen um laksin norðan fyri Føroyar*



# 45 íslendingar til Føroyar at syngja

Áki Bertholdsen

Í morgin kemur eitt vælmanna íslendskt ferðalag til Føroyar at vitja.

Talan er um einar 45 sangarar í Kallakóri Keflavíkar, sum koma higar at hava konsert.

Annars eru eini 70 fólk í ferðalagnum, sum fer avstað aftur týsdagin 6. juni.

Á Føroyaferðini skal kallakórið hava fýra konsertir.

Fyrsta konsertin verður í Kommunuskúlanum í Havn hósdagin 1. juni kl. 20.

Fríggjadagin 2. juni syngur kórið á kórstevnuni í Norðurlandahúsinum.

Triðja konsertin verður í Miðvágs Kirkju leygardagin 3. juni kl. 16 og seinasta konsertin verður á Norðoyastevnu í Klaksvík sunnudagin 4. juni. Nær og hvar verður lýst seinni.

Á konsertunum fer kórið at syngja íslendsk og útlendsk løg.

Kórleiðari er Vilberg Viggósson og tey, sum spæla afturvið sanginum eru Ágota Joó á piano, Ásgeir Gunnarson á harmoniku og Gunnar Ingi Gudmundsson spælir bass. Steinn Erlingsson syngur solo.

Keflavík og Miðvágur eru vinarbýir og tá ið íslendska ferðalagið kemur við flogfarinum, verður tað bygdarráðið í Miðvági, sum tekur ímóti.

Ferðalagið fer síðani útferð til Bíggjar, áðrenn farið verður í skúlan í Miðvági, har kórið syngur nakrar sangir.

Aftaná konsertina bjóðar kommunan teimum okkurt til matna.

Íslendingar siga, at teir vóna eisini at síggja miðvingar í Keflavík onkuntíð, tí tey vilja fegin styrkja vinabýarsamstarvið.

Í Klaksvík er tað Klaksvíkar Kommuna og Føroya Bjór, sum taka ímóti.

At Føroya Bjór er við í móttøkuni hevur sína serligu orsøk. Tað er tí, at ferðaleiðari hjá íslendingum er Hjalmar Waag Árnason, sum eisini er altingslimur.

Millumnavnið sigur okkum, at hann er ikki heilt ókendur í Klaksvík.

Á Føroyaferðini fara íslendingarnir eisini fleiri útferðir, eitt nú til Gjáar, Kirkjubøar, Tjørnuvíkar og undir Vestmannabjørgini.

Tey fara eisini á hyggja at kirkjuni í Gøtu og tey støkka eisini inn á gólvið á Tøtingarvirkinum.

Kallakór Keflavíkar varð stovnað í 1953 og tað hevur fyrr havt konsertir í sjey londum, bæði í Evropa og í Amerika.

Kórið hevur verið í Føroyum einferð fyrr, tað var í 1984, tá ið konsert var í Havn, í Klaksvík og í Vági.

Kórið hevur eisini givið eina fløgu út, hon nevnist Suðurnesjamenn og verður at fáa á konsertunum.



*Kallakór Keflavíkar er ikki ókent í Føroyum. Tað hevur verið her einaferð, men tað er langt síðani. Nú kemur tað aftur at halda fýra konsertir í Havn, í Miðvági og í Klaksvík*

# Skar treytirnar út í papp fyri føroyingum

*–Nú er tað sagt einaferð enn: Taka føroyingar fullveldi, fáa vit ikki longri skiftistíð enn trý, fýra ár og tað verða ongar snildar loysnir gjørdar fyri at sleppa undan hesi ábyrgd, sigur formaður sambandsfloksins, Edmund Joensen*

Áki Bertholdsen

– Nú er tað skorið út í papp fyri føroyingum: Taka vit fullveldi, fáa vit ikki longri skiftistíð enn trý fýr ár.

Tað hevur Edmund Joensen, formaður sambandsfloksins, fingið burturúr røðuni, sum danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen helt í danska fólkatinginum hósdagin, nú tingsetan endaði.

Í røðu síni nam danski forsætisráðharrin, ikki óvæntað, eisini við føroysk viðurskifti og, ikki minst, fullveldisætlanina hjá sitandi samgongu.

Og Poul Nyrup endurtók, at vilja vit hava fullveldi, verður skiftistíðin stutt og



tað verður ikki talan um, at vit fáa keypt okkum eyka skiftistíð við at útseta ígildiskomuna av einum fullveldissáttmála.

### Skorið út í papp

Edmund Joensen, formaður sambandsfloksins, heldur fyri so vítt ikki, at tað var nakað nýtt í tí, sum forsætisráðharrin førdi fram.

–Í røðuni, endurtók, undirstrikaði og staðfesti Poul Nyrup Rasmussen bara tað, sum stjórnin hevur boðað frá undan samráðingum, í samráðingunum og tað, sum orðaskiftið á Christiansborg vísti, at danska fólkatinginum tekur undir við.

– Og tað er, at taka vit fullveldi, fáa vit ikki meiri enn trý, fýra ár at laga okkara búskap til tær nýggju tíðirnar.

– Og tað koma ongar snildar loysnir uppá tal fyri at útvega okkum eina euka skiftistíð.

Edmund Joensen hevur eisini hevt seg við, at Poul Nyrup Rasmussen eisini boðaði frá, at tá skiftistíðin er av, verða føroyingar at rokna sum aðrir norðurlendingar.

Samstundis er tað framvegis onki sum bendir á, at føroyingar fara at fáa sersømdir av nøkrum slag.

Alt hetta sigur honum so mikið sum tað, at eitt fullveldi fer at skerja livifótin so ógvusliga, at vit verða sett nógv, nógv ár.

–Samstundis verður tað týðiigari og týðiligari, at, landsstýrið als ikki fer at klára at liva upp til lyftini um, at í einum fullveldi verður tað føroyska samfelagið betri enn tað hevur verið.

Tvørturímóti verður tað alt sjónskari og sjónskari, hvørjar avleiðingar tað fer at fáa fyri livistøðið.

–Útrokningarnar vísa, at sjálvt við eini skiftistíð upp á 15 ár, fer livistøðið at lækka so nógv, at vit kom at darla nógv ár aftanfyri tey lond, okkum dámar at sammeta okkum við, eitt nú á heilsuviðurskiftum, pensjónsviðurskiftum og útbúgvingum.

Annars vísir Edmund Joensen á gularótina frá Høgna Hoydal til donsku stjórnina, at um vit fáa eina skiftistíð uppá 16 ár, fer dnski staturin at spara 20 milliardir afturímóti um vit skulu hava blokkstuðul óbroytt tey næstu 20 árini.

–Hetta vísir bara, hvussu nógv fullveldið fer at kosta okkum- heilar 20 milliardir t ey næstu 20 árini.

Hann er eisini ósamdur við Høgna Hoydal, sum í Sosialinum leygardagin fýlist á, at føroyska andstøðan letur seg brúka í einum innanhýsis donskum, politiskum talvi.

– Andstøðan í Føroyum letur seg ikki brúka. Vit hava sanniliga givið samgonguni arbeiðsfrið. Vit hava ongantíð verið í parti við samgonguni. me nvit hava ávara ímóti, hvat fór at henda. Og tað er júst tað, sum er hent, Tí er tað ikki andstøðan, sum endurtekur Poul Nyrup.

– Tað er øvugt, sigur Edmund Joensen.

